*- Tað er hugaligt, at føroysku feløgini hava staðið seg so mikið væl í Europa Cup higartil.*

*Todi Jónsson, føroyskur álopsspælari hjá norska Start*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# ÍTRÓTTUR

# B36 kemur flúgvandi inn á Skála

**Hýrurin er góður í B36 eftir flotta sigur á Malta í vikuni, men lið hava tað ofta trupult í landskappingini eftir europeiskar dystir. Hesaferð skal B36 tó spæla ímóti liði, sum spældi strævnan Europa Cup dyst so seint sum hóskvøldið**

SKÁLA-B36

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B36 kann við einum sigri á Skála toga seg inn á oddaliðið EB/Streym, meðan Skála hugsar um at sleppa leyst av botninum.

Bæði B36 og Skála hava spælt europeiskar dystir í vikuni, og tað plagar ofta at merkja trupulleikar í heimligu kappingini í næsta dysti. Hesaferð eru bæði liðini í somu støðu, men B36 hevur tann fyrimunin, at spælararnir hava hvílt longri síðani seinasta dyst.

B36 spældi í nógvum hita á Malta týskvøldið og vann heili 3-0, meðan Skála brúkti nógv orku í dystinum ímóti Start á Svangaskarði í gjárkvøldið.



*Bæði Skála og B36 hava havt strævnar europeiskar uppgávur í vikuni, men nú skulu liðini manna seg upp til landskappingardyst á Skála sunnudagin*

**Skála hevur skaðar**

Skála kann ikki brúka verjuspælaran Arnhold Berg til dystin sunnudagin, tí hann fekk reytt kort seiansta vikuskiftið. Miðvallarovastin Pauli G. Hansen gavst at spæla á Svangaskarði hóskvøldið, og hann hevur ein skaða í økslini at stríðast við.

Pætur Dam Jacobsen spældi aftur hóskvøldið, men hann hevur ikki spælt nógvu seinastu umførini, og orkan var ikki, sum hon plagar at vera. Bjarni Jørgensen og Bárður Danielsen eru ikki komnir fyri seg eftir skaðar enn.

B36 hevur ikki spælt í Formuladeildini í tvær vikur, men sunnudagin koma teir við góðum sjálvsáliti inn á Skála at royna seg. Teir hava allar teir, sum hava spælt seinastu umførini, tøkar til dystin.

# NSÍ leitar eftir styrki

**Iulian Florescu hevur vant í NSÍ, men runavíkingar vilja einki siga um, hvørt hann spælir við NSÍ sunnudagin. Tað verða aftur fleiri broytingar á liðnum hja VB/Sumba**

NSÍ-VB/SUMBA

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hava søgur gingið um, at NSÍ leitar sær eftir styrkið til liðið. Venjarin Trygvi Mortensen váttar, at onkur nýggjur spælari er uppá tal.

– Enn er einki komið upp á pláss, og eg vil einki siga, fyrr enn tað er púra vist. Tað kann verða, at onkur nýggjur spælari er við sunnudagin, segði Trygvi Mortensen fríggjamorgunin.

Iulian Florescu, sum byrjaði kappingarárið í Klaksvík, hevur vant við NSÍ, og hann skal verða ein av teimum, sum er upp á tal í NSÍ. Jónstein Petersen, sum hevur spælt í vinstru, er farin av landinum og verður burtur eina tíð, og tí er tað upplagt við Iulian sum avloysara fyri hann.

NSÍ hevur annars allar spælararnar tøkar til dystin sunnudagin.

**VB/Sumba skiftir aftur**

Suðuroyarliðið í Formuladeildini er øðrvísi mannað til dystin sunnudagin, enn liðið var seinast.

Dan Djurhuus og Evrard Ble høvdu báðir leikbann, og teir kunnu spæla í Runavík, men hinvegin hevur serbiski verjuspælarin Dimitrij Jakovic leikbann eftir reytt kort, og hin serbiski spælarin er ivasamur.

Hallur Dam Joensen verður heldur ikki við sunnudagin, tí hann er skaddur, og bæði Sonni Kjærbæk og Karl Lisberg mugu sita uttanfyri, eftir at teir fingu skaða í dystinum seinast.

– Vit hava fingið stig í teimum seinastu dystunum, og eg gleði meg veruliga, til vit hava allar spælararnar tøkar aftur, sigur VB-venjarin Ole Andersen.

## Nú vil HB vinna aftur

**Álopsspælari hjá HB er leigaður til B68 undan dystinum teirra millum í Gundadali sunnudagin. HB hevur ikki vunnið dyst í meira enn ein mánað, og nú skal Rógvi Jacobsen seta ferð á liðið aftur**

HB-B68

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

HB-liðið er svangt eftir sigri. Síðani 21. mai hevur liðið spælt átta dystir, og bert tvær ferðir hevur tað eydnast HB at vinna. Seinasti sigurin hjá HB var tann 11. juni á Skála, og tað fyri meira enn einum mánaði síðani.

– Vit hava eitt mál við dystinum sunnudagin, og tað er at vinna. Tað var sera skuffandi, at vit ikki vunnu í Vági seinast, tí vit høvdu alt spælið og áttu at vunnið, sigur Krzystof Popczynski, venjari hjá HB.

Til dystin sunnudagin hevur hann væntandi Rógva Jacobsen tøkan til álopið hjá sær. Fyrrapartin í dag var spæliloyvið hjá honum ikki komið til HB, men roknað varð við, at tað kom í rættlag seinni á degnum.

B68 hevur tað tungt í botninum, og fyri viku síðani skifti liðið venjara. Seinasti dysturin endaði við javnleiki, men hesaferð er uppgávan munandi strævnari.

Jann Ingi Petersen hevur leikbann til dystin ímóti HB, men Øssur Hansen er heima aftur, og hann verður vætnandi við í hópinum.

B68 hevur eisini leigað Hendrik Rubeksen úr HB, og hann vilja teir gjarna brúka longu sunnudagin. Spurningurin er bara, um HB vil loyva B68 at brúka sín egna álopsspælara ímóti sær. Fyrrapartin fríggjadagin vóru ikki allir smálutirnir í avtaluni komnir upp á pláss, men tað var í øllum førum roknað sum vist, at Hendrik nú verður leigaður til B68.